Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Karlot Hergeirsson, løgtingsmaður

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Nýggi túrurin til Nólsoyar

Spurningar:

1. Nær kunnu nólsoyingar vænta, at nýggi túrurin til Nólsoyar kemur?
2. Er samráðið við nólsoyingar byrjað um, nær á degnum nýggi túrurin skal liggja?

Viðmerkingar:
Tað hevur verið eitt ynski frá nólsoyingum í nógv ár at fáa fleiri túrar á ferðasambandinum til Nólsoyar. Tað eydnaðist loksins til løgtingsfíggjarlógina í ár, og pengar vórðu settir av til ein dagligan túr afturat til Nólsoyar.

Tað eru nokk ymiskar meiningar ímillum nólsoyingar, nær hesin túrurin skal liggja; tí má hetta gjøgnumhugsast. Tí eigur Strandfaraskip Landsins at seta seg í samband við nólsoyingar og hava samráð við teir um, nær hesin túrurin skal liggja, so flest fáa nyttu av honum.

Nú er aprílmánaðurin hálvrunnin, og enn er hesin túrurin ikki komin. Mær vitandi hevur einki samráð verið við nólsoyingar enn.

Tann 19. februar í ár setti eg avarðandi landstýrismanni í fiskivinnu- og samferðslumálum líknandi spurningar. Men tað kom einki ítøkiligt svar frá táverandi landstýrismanninum uttan tað, at Strandferðslan enn var ígongd við at kanna hvílutíð hjá manningini og annað, og at landsstýrismaðurin var ótolin, og at hetta mátti loysast, áðrenn komið varð inn í várið.

Várið er her nú, og enn røkist einki fyri hesum nýggja túri. Mær vitandi hevur einki samráð verið við nólsoyingar enn um hendan túrin.

Tí seti eg enn einaferð hesar spurningar.

Á Løgtingi, 15. apríl 2025

Karlot Hergeirsson